# Nógv virksemi er við bryggjukantin í Sørvági

**Nógv skip hava verið á Sørvági seinastu tíðina. Flestu hava lagt veiðina upp til Landingarmiðstøðina, og onnur hava verið eftir fólki og útgerð**

SØRVÁGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Norðborg á Sørvági langa fríggjadag eftir manning og útgerð. Teir fóru útaftur um kvøldið og vóru úti um páskirnar*

Á heimasíðuni hjá Sørvágs kommunu duttu vit á einar tríggjar vinnuligar tíðindastubbar, sum geva heimasíðuni ein frískligan dám.

Vit kunnu lesa um nóta- og trolskipið, Norðborg, sum var á Sørvági langa fríggjadag eftir fólki og útgerð.

Umframt at proviantera, bunkraði skipið eisini 100 túsund litrar av gassolju.



*Línuskipið Venus landar í Sørvági. Teir hava roynt undir Íslandi – og hava lagt ein part av veiðini upp í Vestmannaoyggjunum*

### Úti um páskirnar

Nótaskip eru ikki hvønndagsgestir í Vágunum og soleiðis heldur ikki í Sørvági.

Upplýst verður, at skipið hevur verið í dokk í Reykjavík, har ymiskt viðlíkahaldsarbeiði er gjørt.

Teir avgjørdu at leggja inn á Sørvág eftir fólki og útgerð, áðrenn stevnt varð til fiskiskap seinni langa fríggjakvøld.

Norðborg fór ætlandi suður móti markinum at royna, nú svartkjafturin er komin í føroyskan sjógv.

Sum skilst, hava svartkjaftaskipini brúkiligan fiskiskap á hesi leið í løtuni.

11 mans eru við Norðborg, sum ætlandi var til fiskiskap um páskirnar.



*Tummas Nyggaard við stívliga 80.000 pundum, sum teir hava fingið vestanfyri*

### Venus undan Íslandi

Á heimasíðuni vita tey eisini at siga, at Landingarmiðstøðin í Sørvági landaði línuskipið, Venus, í páskavikuni. Hendan túrin hevði línuskipið verið undir Íslandi.

Annars hevði túrurin hjá Venusi verið í tveimum. Tað fyrsta, teir høvdu fingið undir Íslandi, høvdu teir lagt upp í Vestmannaoyggjunum, og síðan løgdu teir tað, sum fingið varð teir seinnu dagarnar, upp í Sørvági.

Veiðan, sum løgd varð upp í Sørvági, var umleið 450 kassar.

14 mans vóru við Venusi hendan túrin, og teir hildu páskir heima við hús.

### Nógv virksemi

Sum skilst á heimasíðuni hjá Sørvágs kommunu, hevur fitt av virksemi verið á Landingarmiðstøðini í Sørvági fyrsta ársfjórðing í ár.

Umframt Venus, landaðu eisini línuskipini, Tummas Nygaard, Grani og Morgunstjørnan í Sørvági herfyri. Haraftrat hevur trolarin, Vesturvarði, eisini lagt veiðina upp í Sørvági.

Sum skilst, er tað misjavnt, hvussu nógv arbeiði er á Landingarmiðstøðini, men tá ið ”rendini” eru, hava landararnir í Sørvági og tey, sum skilja fiskin inni á Landingarmiðstøðini, nóg mikið at gera.

# Faroexpo – ”kon

**– Aftur hesaferð koma vinna og mentan at njóta gott av hvørjum øðrum, meðan altjóða vinnustevnan verður hildin í Runavíkarøkinum, sigur Símun Hammer á Sp/f Virkisráðgevingini, sum samskipar Faroexpo**

FAROEXPO 06
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Síðsta mikudag skipaði Virkisráðgevingin í Saltangará fyri tíðindafundi í býráðsskrivstovuni í Saltangará um altjóða vinnustevnuna, Faroexpo 06.

Tað er Sp/f Virkisráðgevingin, ið samskipar Faroexpo, sum í ár verður hildin í Runavík í døgunum, 24.-26. oktober.

Vinnustevnan varð fyrstu ferð hildin í fjør heyst, og fyrireikararnir eru samdir um, at stevnan eydnaðist sera væl.

– Í ár fara vit at víðka nakað um tiltakið, og vit hava stórar vónir um stevnuna hesaferð, sigur Símun Hammer á Virkisráðgevingini.

Eins og í 2005, verður aftur í ár skipað fyri eini mentanarviku í Runavík, meðan Faroexpo verður hildin. Mentanarliga skráin verður sera fjølbroytt við konsertum, framsýningum, events av ymiskum slag og øðrum.

– Soleiðis koma vinna og mentan aftur í ár at njóta gott av hvørjum øðrum, sigur Símun Hammer.

Í stuttum er Faroexpo stevnan fyri ídnaðar-og tænastufyritøkur innan fiski-og oljuvinnu.

Sambært Virkisráðgevingini eru fyrireikingarnar til stevnuna nú komnar so mikið áleiðis, at konseptið er staðfest.

Símun sigur, at yvirskipaða endamálið við vinnustevnuni er at vera eitt átak, sum er vitanarrættað, útflutningsrættað og mentanarrættað.

– Hetta skal náast við, at vinna og myndugleikar í Føroyum og uttanlands fáa høvi at knýta gagnlig sambond og menna framtíðar samstarv – og fyri almenningin verða fyrilestrar um viðkomandi evni fyriskipaðir, sigur hann.

### Luttakarar

Útlendska luttøkan á stevnuni í ár verður víðkað. Innbodnu luttakararnir hesaferð koma úr skandinavisku londunum, serliga Danmark, Noregi og Íslandi. Aftrat hesum, er luttøkan víðka til eisini at fevna um Estland og Letland – og eisini eru einstøk virkir úr Bretlandi við.

– Málið fyri 2006 er, at 35 føroysk og 50 útlendsk virkir og stovnar luttaka á tí, sum rópt verður partenariatinum. Talan verður um virkir og stovnar innan ídnaðarvinnuna, tænastuvinnuna og oljuvinnuna.

Símun vísir á, at endamálið er at skapa varandi úrslit gjøgnum samstarv millum føroyskar og útlendskar fyritøkur og stovnar.

– Um útlendsku fyritøkurnar eru heldur fleiri í tali enn føroysku, gerst møguleikin fyri at finna varandi samstørv eisini størri, heldur hann.



*– Alt er nýtt, og eg eri við frá byrjan. Tað ger ikki uppgávuna minni áhugaverda og spennandi, sigur Rut Smith Láadal, sum verður dagligur leiðari í Kalos*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# ıseptið" fyri 2006 er nú staðfest

### Útbýtið á Faroexpo

Á Faroexpo verða eitt nú fundir við møguligar samstarvsfelagar frameftir, har fyritøkur sjálvar velja, hvønn tær vilja hava fundir við. man vil hava fund við.

Sp/f Virkisráðgevingin vísir annars á hesar møguleikar:

- Fundir við møguligar keyparar av teimum vørum/ tænastum, sum tykkara virki bjóðar
- Vitan um veiting til oljuvinnuna, eitt nú koma innkeypsfólk frá fyritøkum innan oljuvinnuna at luttaka á partenariatinum
- Samstarv við útlendskar fyritøkur, sum ein møguleiki fyri at byrja ella økja um útflutning
- Netverk: Eitt partenariat skapar meira enn nakað annað átak eitt gott netverk millum fyritøkur

– Vit vilja leggja stóran dent á at røkja hetta netverk og fáa tað til at veksa so hvørt, sum tiltøkini verða fleiri. Eitt netverk gevur stórar møguleikar fyri óformellum og formellum samstarvi og samskifti, tá ið avbjóðingar eru, sigur Símun Hammer.

### Almenni parturin

Ein týðandi partur av Faroexpo er almenna ráðstevnan.

Í 2005 hevði ráðstevnan góð 200 vitjandi. Tá varð dentur lagdur á evnir innan útflutningsfígging og oljuvinnuna.

– Í ár hava vit valt at leggja dent á tvey høvuðsevni, nevniliga ES og varandi orkukeldur. Undirevnini, sum verða umrødd av viðurkendum fyrilestrarhaldarum, eru m.a.:

- Vinnumenning gjøgnum ES-verkætlanir
- Føroyar og ES: Eru forðingarnar forðingar ?
- Hvat vildi fiskivinnupolitikkurin í ES ført til fyri Føroyar?
- Hvussu er ES samansett, Mál, visiónir og strukturur?

Eisini verður røtt um varandi orkukeldur, sólorku, brint og aðrar loysnir, sum arbeitt verður við globalt.

– Hesir fyrilestrar eru almennir, meðan partenariatsparturin bert er fyri fyritøkur, sum hava fulla luttøku á Faroexpo, sigur Símun Hammer.




*Tað er Sp/f Virkisráðgevingin, ið samskipar altjóða vinnustevnuna, Faroexpo, sum í ár verður hildin í døgunum, 24.-26. oktober. Myndin er tikin á tíðindafundi í býráðshøllini í Runavík síðsta mikudag*

---



# Kalos – skósøla í "nýggjum" hølum í Heiðunum

**Jeffri Johannesen og Leif Høj yvirtóku um ársskiftið Skósøluna hjá Tórleifi Hansen í Runavík. Hølini eru sett í stand, og bygningurin er klæddur á framsíðuni. Skósølan skiftir eisini navn, og dagligur leiðari verður Rut Smith Láadal**

SKÓSØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Vit keyptu Skósøluna hjá Tórleifi og bygningin, har skósølan heldur til, um ársskiftið. Vit høvdu útsølu í januar, og stongdu síðan aftur síðst í mánaðinum. Síðan hava vit sett hølini í stand av nýggjum, og í morgin lata vit uppaftur –. í nýístandsettum og snotuligum hølum og undir nýggjum navni.

Tað sigur annar av eigarunum, Jeffri Johannesen.

### Vakurleiki og dygd

Men hvat merkir so "kalos", spyrja vit Jeffri:

– Kalos er grikst og merkir vakurt, prýðiligt, vælgjørt – ella dygd, sigur hann.

Uppi á í bygninginum í Heiðunum er íbúð, og har fer dagligi leiðarin í Kalos, Rut Smith Láadal, at húsast.

Vit venda aftur til Rut og hennara útbúgving og royndir seinni í greinini.

Jeffri Johannesen sigur, at Kalos fer at selja skógvar bæði til menn, kvinnur og børn, og millum kendu merkini verða eitt nú ekkoskógvar, ambre-skógvar og sanilet-skógvar.

– Vit fara at hava eitt breitt úrval av skóm til allar aldursbólkar, og vit fara eisini at hava góðar gangi- og renniskógvar. Í byrjanini fara vit ikki at selja fótbóltsskógvar sum so, men um hetta verður ein partur av úrvalinum seinni, fer tíðin at vísa, sigur hann.

### Dagligur leiðari

Tað verður Rut Smith Láadal, sum verður dagligur leiðari í Kalos.

Hon hevur búð í Danmark og hevur seinastu árini arbeitt hjá fyritøkuni, Sanita í Ikast.

– Hetta er eisini ein skógvaverksmiðja, sum eitt nú ger tuflur og trygdartuflur, sigur hon.

Rut er útbúgvin procesdesignari í Herning. Hetta er ein design-skúli, har hon hevur spesialiserað seg í skóm. Hetta er ein styttri útbúgvin sum framleiðsluleiðari.

Rut sigur, at hon tekur við spenningi ímóti uppgávuni sum dagligur leiðari hjá Kalos í Heiðunum.

– Alt er nýtt, og eg eri við frá byrjan. Tað ger ikki uppgávuna minni áhugaverda og spennandi, sigur hon.

### Dygd og prísir

Gjøgnum sítt arbeiði í Danmark kennir Rut eisini søluliðið, tí umframt starvið hjá Sanita í Ikast, hevur hon eisini arbeitt hjá danskari stórketu, ið selir skógvar.

– Vit fara at hava eitt breitt úrval av skóm, og vit arbeiða fram ímóti at kunna veita okkara viðskiftafólkum bæði bíligar, miðal-og dýrar skógvar – til allar aldursbólkar og bæði kynini.

Rut Smith Láadal sigur, at málið hjá Kalos er at vera kappingarførir í úrvali, dygd og prísi.